SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er stuldur at skipa fyri vali nú, tí tað einasta endamálið er at taka sigurin í fjør frá okkum*

*Hamas-talsmaður*

# Bush sinnaður at lata Guantanamo aftur

**Men fyrst skal greiði fáast á ymsum spurningum um teir 375 fangarnar, sum framvegis eru í leguni**



*Sambært keldum í Hvítu Húsunum hevur George W. Bush, forseti, gjørt av at lata Guantanamo-leguna aftur*

Hóast stórt altjóða trýst hevur George W. Bush, forseti, víst aftur øllum áheitanum um at lata ta illa kendu fangaleguna í Guantanamo aftur. Í seinastuni hevur forsetin kortini víst tekin til broyting, og herfyri ásannaði hann, at legan í Kuba hevur verið óheppin fyri umdømið hjá USA kring heimin.

Nú hava keldur í Hvítu Húsunum avdúkað, at í veruleikanum restar lítið í, at legan verður latin aftur. Tíðindastovan AP skrivaði í morgun, at ætlanin var, at Bush skuldi hava ein fund í dag við Condoleezza Rice, uttanríkiaráðharra og Robert Gates, verjumálaráðharra um ætlanina at lata leguna aftur, men at fundurin bleiv avlýstur, tá fjølmiðlarnir fingu frænir av ætlanini.

Ein kelda hjá AP sigur, at fleiri spurningar í sambandi at lata leguna aftur eru svaraðir, men at nakrir eru eftir. Ein teirra er, hvat skal henda teimum 375 fangunum, sum framvegis eru í Guantanamo-leguni. Fleiri av fangunum skulu fyri rættin, áðrenn teir kunnu sendast av landinum, og USA noyðist eisini at tryggja sær, at heimlondini vilja hava fangarnar aftur.

Talskvinnan hjá Hvítu Húsunum, Dana Perino, vildi í gjárkvøldið ikki gera viðmerkingar til tíðindini um, at legan skal latast aftur, men hon viðgekk, at viðurskiftini hjá fangunum eru til umrøðu í hesum døgum.

# Blair endiliga katolikkur

**Longu sum ungur kendi Tony Blair seg drignan at katólsku læruni, men orsakað av sínum politiska virksemi hevur hann ikki verið limur í katólsku kirkjuni**



*Sum forsætisráðharri hevur Tony Blair hitt Benedikt páva, men næstu ferð teir hittast, er tað privatmaðurin Tony Blair, sum kemur á vitjan*

Tann 27. juni leggur Tony Balir frá sær sum vretskur forsætisráðharri, og síðani fer hann til Rom at hitta Benedikt páva, tí nú vil Blair verða katolikkur, skrivar bretska blaðið The Guardian.

Sambært blaðnum kendi Balir seg drignan at katólsku læruni, longu tá hann á ungum árum gekk á lærda háskúlanum í Oxford. Kona hansara, Cherie, er katolikkur, og børnini eru eftir gomlum siði uppvaksin sum katolikkar.

Men Balir er ikki katolikkur, tí hansara politiska virksemi forðaði tí. Bretland hevur ongantíð havt ein katólskan forsætisráðharra, og av søguligum orsøkum er katólska læran eitt umstrítt evni í Bretlandi. Henry 8. kongur kvetti sambandið við ta katólsku kirkjuna í 1533, tí pávin sýtti fyri at ógilda hjúnarlagið hjá kongi. Tann seinasti katólski kongurin í Bretlandi, James 2., varð koyrdur frá í 1688, og síðani hevur tað verið bannað katolikkum at gifta seg við bretska konginum ella trúnarvinginum.

## STUTT SAGT

### Ikki njósnari kortini

Í síðstu viku tók trygdarløgreglan í Eysturríki ein mann, sum arbeiddi hjá russisku rúmdarumsitinguni, tí eysturríksku myndugleikarnir vildu vera við, at maðurin var njósnari. Men í gjár varð hann latin leysur, skrivar russiska tíðindastovan RIA Novosti. Sambært tíðindastovuni mótmæltu myndugleikarnir í Moskva handtøkuni og vístu á, at maðurin var diplomatur. Hvussu er og ikki, so slapp maðurin úr varðhaldinum, og hann sleppur eisini aftur til Russlands, skrivar RIA Novosti.

### Irakar samdir um olju

Irakska oljumálaráðið kunngjørdi í gjár, at eftir drúgvar tingingar eru sunnimuslimar, shiamuslimar og kurdar vorðnir samdir um, hvussu teir skulu býta landsins oljuríkidømi sínamillum. Semjan umfatar kortini bara tann kurdiska partin av oljuni, men hon verður kortini mett at vera eit sera týðandi stig fram ímóti einari endaligari semju um oljuna. Sum skilst vóru kurdarnir ikki serliga sinnaðir at góðtaka semjuna, men teir gjørdu tað kortini. Hildið verður, at 112 mia. tunnur av olju eru í irakskuundirgrundini, og tað eru bara Saudiarabia og Iran, sum hava størri oljuríkidømi enn Irak.

### Skifta til evruna

Tvey ES-lond afturat hava nú gjørt av at brúka felags evropeiska gjaldoyrað, evruna. Í gjár fingu Malta og Kýpros loyvi at skifta til evruna, og tað ber í sær, at á nýggjárinum fara maltesiski lirin og kýpriska pundið úr gildi. Í januar í ár bleiv evran tikin í nýtslu í Slovenia, og við Malta og Kýpros kemur talið á evrulondunum upp í 15. Tað merkir, at 12 ES-lond hava framvegis síni gomlu gjaldoyru.